Fylgiskjal 6

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

við Áir 1. juli 2019

Til Mentamálaráðið
mmr@mmr.fo

**Hoyringarsvar til lógaruppskot um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan**

Fiskaaling hevur fingið fatur í hesum lógaruppskoti á heimasíðuni hjá Granskingarráðnum og metir tað verða viðkomandi hjá okkum at lesa og gera viðmerkingar til lógaruppskotið. Av tí at vit ikki hava fingið lógaruppskotið beinleiðis til hoyringar, hevur skotbráið at gera hoyringarsvar stutt.

Sum Fiskaaling skilur ávirkar hetta lógaruppskot ikki P/F Fiskaaling og mátan Fiskaaling verður rikið uppá. Og tað er við støði í hesum vit hava lisið lógaruppskotið.

Fiskaaling hevur fylgjandi viðmerkingar:

Fiskaaling heldur tað verða gott at ymisku hugtøkini verða allýst í § 4.

Ómiddelbart heldur Fiskaaling tað verða skilagott at styrkja og samskipa ymiska granskingarvirksemi í Føroyum umframt samskipa altjóða og norðurlendska granskingarsamstarvið.

Tað er trupult at meta um hvussu nýggi bygnaðurin, sum lógaruppskotið leggur upp til, fer at virka. Ansast má eftir, at nýggja skipanin ikki verður ein ov bureaukratisk skipan, ið fevnir um *Ráð fyri gransking, menning og nýskapan* (kap. 2, §§ 5-10), *Faknevndir* (§ 12), *Stýrið* (§ 13 og 14) og *Fyrisiting* (§ 15 og 16).

Fiskaaling tekur undir við at tað verður gjørd ein árlig frágreiðing um gransking, menning og nýskapan.

Fiskaaling metir tað verða skilagott, at umsóknir verða sendar til metingar, sum ásett í § 19. Út yvir at metingar eru hentar hjá faknevndunum at halda seg til, tá umsóknirnar verða viðgjørdar, kunnu metingarnar verða góðar hjá umsøkjarunum at brúka. Tað eigur tó at verða møguligt at játta granskingarstuðul til umsóknir uttanum óhefta meting – hetta kann serliga verða viðkomandi, tá talan er um nýggj økir, ið ikki hava serkønan føroyskan førleika.

Blíðar heilsur

Jóhanna Lava Køtlum
stjóri